Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Fíggjarfulltrúi/controllari

Eitt starv sum fíggjarfulltrúi/controllari í Nærverkinum verður hervið lýst leyst til setan skjótast tilber.

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv í fakligum umhvørvi, har møguleiki er fyri at vera við til at menna fíggjarøkið í Nærverkinum.

Nærverkið er skipað við Meginskrivstovu og 4 tænastudeildum. Virksemið er skipað um alt landið. Tað starvast uml. 1400 fólk í Nærverkinum. Í løtuni rekur Nærverkið virksemi fyri uml. 500 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri og stórar uppgávur liggja fyri framman innan øll okkara virkisøkir.

Nærverkið leggur dent á at hava eina miðvísa og javna tænastu innan teir karmar, politiska skipanin ásetur. Fíggjarstýring, játtanareftirlit og áhaldandi leiðslukunning hevur í hesum sambandi ein avgerðandi leiklut.

Vit hugsa okkum ein persón, ið dámar væl at arbeiða við tølum og dugir at samantvinna fíggjarliga tilfeingið við virksemið, ið fer fram í Nærverkinum. Hevur evni at skapa og framleiða vitan, ið kann nýtast sum grundarlag undir allari støðutakan og leiðslukunning. Hevur hegni til at skapa framtíðarloysnir og at seta hesar í verk, er sjálvstøðugur, hjálpsamur og hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir.

**Vit leggja eisini dent á, at tú:**

- Hevur viðkomandi útbúgving, helst frá hægri lærustovni
- Hevur royndir innan fíggjarstýring
- Ert kønur í telduskipanum og dátugrunnum
- Hevur kunnleika til almenna fyrisiting
- Hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- Ert álítandi og nærlagdur.

Starvið er skipað við tilvísing til leiðsluna fyri Búskapardeildina, ið er skipað sum tvørgangandi stápur á Meginskrivstovuni.

**Løn- og setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið fevnir um Nærverkið og tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan.
Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 360000.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
FO-110 Tórshavn

Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

**Umsóknarfreist:** 24. november 2008

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

STARVSLÝSING




## Avloysari fyri laborant

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir avloysara fyri laborant til mikrobiologisku kanningarstovuna.

Sí www.hfs.fo ella www.portal.fo.

Freistin at lata umsókn inn er hósdagin 30. okt. 2008.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

## SETHÚS OG VINNUBYGNINGUR
undir Krákugjógv til leigu



Sethúsini eru í 3 hæddum, tilsamans uml. 275 m²
Vinnubygningurin er í 2 hæddum, tilsamans uml. 130 m²

**Kári Justinussen tlf. 21 08 40**




LØGMANSSKRIVSTOVAN

**LEIÐSLUSTARV Í LØGMANSSKRIVSTOVUNI**

Leiðslustarv í Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja við freist **3. november 2008.**

Les meira á www.tinganes.fo undir Størv.

*Løgmansskrivstovan veitir løgmanni ráð og tænastur í sambandi við uppgávur løgmans at stjórna landsstýrinum, og hevur ábyrgd av at fyrireika og fremja uppgávur, sum løgmaður hevur sambært stýrisskipanini.*

Visti tú ikki tað? Sosialurin